FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Tórshavn, 23. februar 2023
Málsnr.: 22/19765

Fylgiskjal 1

Hoyringsnotat

viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort varð lagt til hoyringar tann 24. januar 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 21. februar 2023.

Hoyringssvar er komið frá:

- Almannaverkinum
- Dátueftirlitinum
- Deyvafelag Føroya
- Ferðavinnufelagið
- KT-felagið
- Landssjúkrahúsinum
- SEV
- Útoyggjafelagnum
- Visit Faroe Islands

Tað eru ikki gjørdar broytingar í lógartekstinum, sum úrslit av hoyringini.

Gjørdar eru nakrar broytingar og nærri útgreiningar í viðmerkingunum til lógaruppskotið, har tann mest týðandi broytingin er um viðgerðarheimildina í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Í uppskotinumsum fór til hoyringar stóð í viðmerkingunum, at heimildargrundarlagið var samtykki, sbrt. dáturverndarlógini § 8, stk. 1, nr. 5, men tað er broytt til § 8, stk. 1, nr. 5) um myndugleikaútinnan.

Niðanfyri er ein samandráttur av hoyringssvarunum frá ymisku pørtunum. Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum eru skrivaðar við skákskrift. Fyri at síggja hoyringssvarini í fullum líki, verður víst til sjálv hoyringssvarini, ið eru viðløgd sum fylgiskjal til hetta hoyringsnotat.

Almannaverkið

Almannaverkið skal gera vart við, at Almannaverkið gevur út pensjónistakort til fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar. Hetta verður vanliga brúkt sum avsláttarkort við bussum og skipum hjá Strandferðsluni.

Almannaverkið metir, at tað kundi verið skilagott, um hetta pensjónistakort onkursvegna verður partur av nýggja talgilda samleikakortinum.

Fíggjarmálaráðið:
Uppskotið hjá Almannverkinum er ein av mongu møguleikunum, ið standast av komandi samleikakortinum. Talgildu Føroya seta seg í samband við Almannaverkið at umrøða, hvussu tey kunnu gagnnýta samleikakortið, og hvat skal til tøkniliga fyri at skráseta pensjónistar og fyritíðarpensjónistar í samleikakortinum.

Dátueftirlitið

Viðvíkjandi § 2: Í viðmerkingunum til § 2, stk. 1 í dátuverndarlógini stendur, at loysnin verður ment eftir "*dátuvernd ígjøgnum sniðgeving*." Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at *"brúkarin kann velja, um hann vil deila sítt p-tal ella bústað, alt eftir um hann metir, at hesar upplýsingar eru viðkomandi í einstaka førinum."* Her kundi reglan um "dátuvernd gjøgnum standardstillingar" eisini verðið skoytt uppí, har uppsetingin í útgangsstøði (default) vísir sum minst av upplýsingum.

Dátueftirlitið vil vísa á, at um ein borgari vísir sítt talgilda samleikakort fram, har t.d. p-talið sæst, men ikki verður skrásett av nøkrum, so er ikki talan um viðgerð av persónupplýsingum. Verður p-talið hinvegin skrásett, so er tann fyritøka ella myndugleiki, ið skrásetur, dátuábyrgdari, og skal tá m.a. halda reglurnar fyri viðgerð av persónstalinum, sbrt. § 16 í dátuverndarlógini.

Fíggjarmálaráðið:
"Dátuvernd gjøgnum standardstillingar" meginreglan er løgd afturat í viðmerkingunum sum viðmælt. Eisini er íkasti frá Dátueftirlitinum um dátuábyrgd løgd afturat serligu viðmerkingarnar til § 3.

Viðvíkjandi § 3 - Sambært viðmerkingunum til § 3 er tilmeldingin til talgilda samleikakortið sjálvboðin, tað verður upplýst, at viðgerðargrundarlagið er samtykki.

Dátueftirlitið skal í tí sambandi vísa á, at dátuverndarlógin setur ávísar treytir fyri at nýta samtykki sum heimildargrundarlag. Millum annað er í § 9, stk. 3 ásett, at tað skal vera gjørligt, at taka samtykkið aftur. Ítøkiliga vil tað siga, at øll viðgerð aftaná at samtykkið er tikið aftur í útgangsstøðinum má steðga. Er viðgerðin tann, at upplýsingar hjá skrásetta verða goymdar, so eiga

hesar upplýsingar at verða strikaðar um tann skrásetti tekur sítt samtykki aftur. Er hetta ikki gjørligt, kann samtykkið ikki nýtast sum viðgerðargrundarlag.
Tað eru aðrar viðgerðarheimildir enn samtykki. Tað ber sostatt til at viðgera persónupplýsingar, sjálvt um tann, sum upplýsingar eru um, ikki hevur givið samtykkið. Tað er tá umráðandi at tryggja sær, at onnur heimild er fyri viðgerðini. Um tað t.d. er ásett í lóg, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast, kann hetta verða grundarlagi undir viðgerðini.

Tað framgongur ikki av viðmerkingunum í lógaruppskotinum, hvat samtykkið fevnir um. Um samtykkið bert fevnir um ítøkiliga talgilda samleikakortið, so er Gjaldstovan/Talgildu Føroyar dátuábyrgdari. Fevnir samtykkið um tær tænastur, ið aðrar fyritøkur og myndugleikar bjóða fram, og sum verða tengdar at samleikakortinum, t.d. koyrikortið, so er Gjaldstovan/Talgildu Føroyar dátuviðgeri, meðan Akstovan er dátuábyrgdari.

Ein borgari kann fáa talgilt samleikakort, um hann góðkennir ásettar "*brúkstreytir*." Tað er ikki greitt í lógaruppskotinum, hvat hesar treytir fevna um. Um treytirnar fevna um, at brúkarin skal vátta fyri at hava lisið ein tekst, ið er kunning sbrt. §§ 23 og 24 í dátuverndarlógini, so er kunningarskyldan hildin. Um teksturin eisini fevnir um treytirnar fyri samtykki sbrt. § 9 í dátuverndarlógini, so eru formiligu treytirnar fyri samtykki eisini hildnar. Um "brúkstreytirnar" ikki fevna um kunning sbrt. §§ 23 og 24 ella treytir fyri samtykkið sbrt. § 9, so skulu hesar skyldur dátuábyrgdarans haldast á annan hátt.

Fíggjarmálaráðið:
Viðmerkingarnar eru broyttar soleiðis, at viðgerðargrundarlagið fyri viðgerðini av persónsupplýsingunum er í § 2, stk. 2 í lógaruppskotinum, dátuverndarlógin § 8, stk. 1, nr. 5) um myndugleikaútinnan og dátuverndarlógin § 16, stk. 1 um viðgerð av persónstalinum. Eisini er útgreina at innihaldið í brúkstreytunum skal tryggja, at kunningarskylda sbrt. §§ 23 og 24 í dátuverndarlógini verður hildin.

Lógaruppskotið fevnir bert um talgilda samleikakortið. Sjálv appin, Skjáttan, ið er "mappan" fyri talgilda samleikakortið, talgilda koyrikortið og møgulig onnur kort ella myndugleikaprógv er tískil ikki fevnd av hesum lógaruppskoti.

Viðvíkjandi § 4 - Í § 4 verður upplýst, at foreldur kunnu fáa eintak av talgilda samleikakortinum hjá sínum ómyndugum børnum. Tað er týdningarmikið at tryggja, at bert foreldur, ið sbrt. lóggávuni hava viðkomandi rættindi, kunnu fáa atknýtt samleikakortið hjá børnunum til sítt egna samleikakort.

Fíggjarmálaráðið:
Hentleikin at umboða síni børn, verður ikki við í fyrstu slepping av talgilda samleikakortinum og hetta skal tí útgreinast væl, áðrenn hetta verður partur av loysnini. Tó kann viðmerkjast, at upplýsingar um, hvør hevur foreldramyndugleika, kunnu heintast úr fólkayvirlitinum.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Deyvafelag Føroya

Deyvafelag Føroya ynskir at allur fastur tekstur, ið er frágreiðing um talgilt samleikakort og brúkaravegleiðing til talgilt samleikakort, verður tulkað til føroyskt teknmál, sum er annað av báðum almennum málum í Føroyum.

Eisini ynskja vit, at tað verður ein "lætt lesilig" útgáva av omanfyrinevnda til tey av okkara, ið ikki eru teknmælt, men lesa skrivað mál.

Fíggjarmálaráðið:
Vegleiðingar hjá Talgildu Føroyum verða altíð skrivaðar so lætt lesiligar, sum til ber. Videovegleiðingar hava eisini føroyskan og enskan undirtekst.

Tað eru ikki nógvar skriftligar vegleiðingar, men heldur smáir hjálpitekstir runt í loysnunum, so hjálpin er júst har, ið tú hevur brúk fyri henni. Talgildu Føroyar leggja sær nær, at skriva við góðum og einføldum málburði, sum allir brúkarar kunna skilja.

Ferðavinnufelagið

Viðv. 1.1. orsøkir til lógarupskotið - Í viðmerkingunum verður vist á, at nógvir áhugapartar í føroyska samfelagnum hava tørv á, at borgarin gevur seg til kennar fyri at veita røttu tænastuna. Víst verður beinleiðis á, at ”her kann m.a. nevnast, at borgarar skulu prógva sín bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni…”

Ferðavinnufelagið heldur ikki, at evnið er nóg væl búgvið enn, til at gera eina slíka lógarheimild til avsláttarskipan. Ferðavinnufelagið hevur áður vist á teir vandar sum standast av avsláttarskipan, við at gera mismun á fólk, grundað á teirra tjóðskap. Ferðavinnufelagið er yvirskipað av tí fatan, at slíkar avsláttarskipanir ikki er rætta loysnin.

Fíggjarmálaráðið:

Endamálið við lógaruppskotinum er, at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum.

Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um ymisku nýtsluøkini, har talgilda samleikakortið møguliga kann verða nýtt. Avsláttarskipanin hjá Strandferðsluni verður bert brúkt sum eitt dømi, har talgilda samleikakortið kundi verið nýtt sum eitt amboð. Um til t.d. Strandferðslan ynskir at stilla sum krav, at fólk á útoyggj, skulu vísa talgilda samleikakortið fyri at fáa ávísan avsláttur, so má Strandferðslan má útvega sær heimild til hetta - heimildin at seta slíka krøv er ikki í hesum lógaruppskotið.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

KT-felagið

KT-felagið hevur ta viðmerking, at nú er tíðin búgvin at leysgeva P-talið, soleiðis at tað kann leinkjast upp ímóti skipanum. Á tann hátt hevði privata vinnan betri kunna ment skipanir, sum krevja samleikaeyðmerking.
KT-felagið hevur fyrr víst á, at leysgeving av P-talinum hevði elvt til stóran framburð í talgildu menningini. P-talið er eyðmerkingin av einstaklinginum. Tað er eingin orsøk at bert summir stovnar skulu hava atgongd til hetta.

Fíggjarmálaráðið:
Átak 5. í nýggju Heildarætlanini[1] fyri Talgildu Føroyar sigur: "Privata vinnan skal, eins og almennir myndugleikar, kunna brúka P-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta er ein fortreyt fyri, at vinnan kann fáa størri gagn av m.a. Samleikanum, Hetta ger talgildingina tryggari og munadyggari fyri alt samfelagið."

Líknandi orðing er eisini í frágreiðingini hjá Vakstrarforum um KT-vinnuna, sí tilmæli nr. 23.

Landssjúkrahúsið

Viðv. § 3. Persónar kunnu fáa talgilda samleikakortið, treytað av, at hesir hava talgildan samleika, sbrt. løgtingslóg um talgildan samleika, og góðtaka ásettar brúkstreytir til talgilda samleikakortið.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur "Endamálið við lógaruppskotinum er, at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum."

Samstundis stendur í serligu viðmerkingunum til §3: "Tað er sjálvboðið at fáa sær talgilda samleikakortið. "

Landssjúkrahúsið heldur at sera stórir møguleikar eru í einum samleikakorti og nógv best hevði verið, um allir borgarar høvdu eitt slíkt samleikakort. Talgilda samleikakortið átti tí ikki at verið sjálvboðið, men eitt krav. Í serligum førum kundi talan verið um eitt fysiskt samleikakort.

Fíggjarmálaráðið:
Útgangsstøði á øllum loysnunum hjá Talgildu Føroyum er, at hetta er sjálvboðið fyri borgaran. Hóast loysnirnar ikki eru lógarkrav, so er undirtøkan stór, t.d. hevur Samleikin í dag áleið 43.000 brúkarar. Tað verða altíð nøkur óansæð lógarkrav ella ikki, ið, av ymiskum orsøkum ikki kunnu ella vilja nýta talgildu amboðini og tískil verður altíð tørvur á, at hava aðrar kanalir opnar.

[1] https://www.talgildu.fo/talgildu-foroyar/a-breddanum/nyggj-heildaraetlan-talgildingin-av-samfelagnum-heldur-fram/

Til Almennu viðmerkingarnar - Vit sakna at heilsuverk og sjúkrahúsverk verða nevnd og havd í huga í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið. Vit síggja nógvar møguleikar við eini slíkari loysn innan heilsugeiran, og hugsa, at hetta átti at verið nýtt á leið á sama hátt sum tað gula "sygesikringsbevis" í Danmark. T.d. sum indentifikatión, tá borgari kemur til egnan lækna, taka blóðroydir, verður innlagdur o.s.fr. So hevði borgarin sloppi undan, at skula kvitta fyri viðtalu hjá egnum lækna. Men eisini sum prógv fyri at viðkomandi borgari hevur rætt til ókeypis sjúkrahúsviðgerð. Á hendan hátt hevði verið lættari at eyðmerkt tey, ið fáa viðgerð á sjúkrahúsum, men eiga at gjalda fyri viðgerðina.

Fíggjarmálaráðið:

Uppskotið hjá Sjúkrahúsinum er ein av mongu møguleikunum, ið standast av komandi samleikakortinum. Talgildu Føroya seta seg í samband við Landssjúkrahúsið at umrøða, hvussu heilsuverkið kann gagnnýta samleikakortið, og hvat skal til tøkniliga fyri at m.a. brúka tað sum kvittan hjá læknaviðtalum.

SEV

Ein viðmerking til uppskotið er at umráðandi er, at uppskotið í nøktandi hátt tekur hædd fyri brúkarum, ið ikki eru førir fyri at brúka KT-loysnir grundað á væntandi førleika á ymiskan hátt.

Fíggjarmálaráðið:
Sum viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga, so skal talgilda samleikakortið vera brúkaravinarligt og lætt atkomuligt hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, so sum blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og øðrum. Hetta skal tryggjast við at fylgja altjóða leiðreglunum um talgilda atkomu, WCAG

Útoyggjafelagið

Nevnd og umboðsráð hava hugt at uppskotinum, og taka undur við tí.

Visit Faroe Islands

Visit Faroe Islands hevur ongar viðmerkingar til sjálvar lógarásetingarnar í uppskotinum, ið eru rættiliga formligar/tekniskar av natúr.

Tá Visit Faroe Islands verður mett at vera viðkomandi hoyringspartur ísv. lógaruppskotið, so hevur tað ivaleyst við ætlaða nýtsluøkið at gera og her reisa seg beinanvegin fleiri spurningar av prinsipiellum slagi, sum ikki verða umrøddir í lógaruppskotinum, og sum vit meta vera neyðugir at hava í huga, tá samleikakortið fer at vera tikið í nýtslu.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fíggjarmálaráðið:

Endamálið við lógaruppskotinum er, at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum.

Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um ymisku nýtsluøkini, har talgilda samleikakortið møguliga kann verða nýtt. Um til t.d. Strandferðslan ynskir at stilla sum krav, at fólk á útoyggj, skulu vísa talgilda samleikakortið fyri at fáa ávísan avsláttur, so má Strandferðslan útvega sær heimild til hetta - heimildin at seta slíka krøv er ikki í hesum lógaruppskotið.

Talgilda samleikakortið er eitt amboð, ið, sum øll onnur amboð, má nýtast við skilið.

Fíggarmálaráðið sær hoyringssvarið frá Visit Faroe Islands sum eitt týðandi íkast til kjakið um, hvussu eitt talgilt samleikakort skal (ella ikki skal) nýtast í føroyska samfelagnum.